Heðin Mortensen **nr. 92/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um landsjørð/festibræv og seyðahald, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Metir landsstýrismaðurin, at lógin um landsjørð, festibræv og seyðahald er nøktandi í Føroyum í dag?
2. Er nøkur skylda ella ábyrgd hjá Búnaðarstovuni at hava eftirlit við ella vitja festir til tess at tryggja, at festibrævið er dagført?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at almenni stovnurin Búnaðarstovan sigur, at lóg, reglur og játtan ikki eru til taks til at hava nøktandi eftirlit við festum og seyðahaldi?
4. Er tað manglandi eftirlit og handling, at Føroya fólk skulu uppliva seyð, sum liggur deyður í raki, sum landbúnaðarfrøðingur úttalaði seg um í fjølmiðlunum?
5. Ætlar landsstýrismaðurin at gera greiðar og fyribyrjandi reglur og lógir at bera í Løgtingið? Um ja, nær kann væntast, at landsstýrismaðurin kemur við hesum í Løgtingið?

Viðmerkingar

Fyri døgum síðan upplivdu Føroya fólk gjøgnum Kringvarpið, at seyður lá deyður ymsastaðni hjá festara. Ikki nøkur vøkur sjón fyri hyggjarar ella umdømið hjá føroyingum, tá talan er um seyðahald.

Ein kann spyrja, hvussu tað ber til, at hetta er komið so langt, og hetta er ikki fyrstu ferð, at slíkt hendir. Vit hava almenna búnaðarstovu og búnaðargrunn, sum eitast at hava, sambært endamálsorðingini hjá stovninum, eftirlit, fyribyrging, ráðgeving og skeiðvirksemi innan allan landbúnað. Ein kann spyrja, hvussu alt hetta kann koma so langt, áðrenn nakar frá almennum stovni ger nakað við málið.

Í hesum konkreta máli var talan um avhendan av festibrævi. Spurningurin er, um ein vitjan á staðnum ikki átti at verið gjørd, áðrenn nýtt festibræv verður góðkent. Eitt, sum undrar, er, at festari kann uttan nakað lata/selja festibræv til annan persón og fáa góðkenning uttan uppgerð ella sýn av festi og fæ.

Landsstýrismaðurin hevur ábyrgd av at tryggja, at okkara umhvørvi, landsjørð, festi og seyðahald eru í lagi. Tí eiga øll hugsandi umsitingarlig stig at verða gjørd, so skeivleikar verða rættaðir beinanvegin.

Á Løgtingi, 27.mai 2020

Heðin Mortensen